TÓRSHAVNAR KOMMUNA



# Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Býlingshúsið á Ternuryggi eftir:**
- einum pedagogi til barnagarðsstovuna Blákollan fyri pedagog í barsilsfarloyvi at byrja 16. august 2004 ella eftir nærri avtalu
- einum pedagogi ella hjálparfólki til tíðaravmarkað starv í vøggustovuni at byrja 16. august 2004 ella eftir nærri avtalu
- einum hjálparfólki til at avloysa tá tørvur er á tí.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum á Ternuryggi í hendi innan **hósdagin 17. juni 2004.**

Leiðari: Heidi Hendriksen, tlf. 318626
Turiðargøta 5 A
100 Tórshavn

**Dagstovnin við Botnánna í Kollafirði eftir:**
- einum pedagogi at arbeiða 28 tímar um vikuna , at byrja 9. august 2004 ella eftir nærri avtalu

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum við Botnánna í hendi innan **hósdagin 17. juni 2004.**

Leiðari: Malan Jógvansdóttir, tlf. 421323/221323
Botnavegur
410 Kollafjørður

**Frítíðarskúlan Stoffalág 60 eftir:**
- tveimum pedagogum at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 8. august 2004 ella eftir nærri avtalu

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir skal vera Frítíðarskúlan Stoffalág 60 i hendi innan **hósdagin 17. juni 2004.**

Leiðari: Mariu Heinesen tlf. 314364/214364
boks 3316
110 Tórshavn

**Býlingshúsið inni á Gøtu eftir:**
- einum pedagogi at byrja 1. juli 2004 ella eftir nærri avtalu
- einum hjálparfólki at byrja 1. juli 2004 ella eftir nærri avtalu

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir skal vera Búlingshúsinum inni á Gøtu i hendi innan **týsdagin 22. juni 2004.**

Leiðari: Poula Ejdesgaard tlf. 317701
Ovaragøta 30 B
188 Hoyvík

**Dagstovnin millum Bóla eftir:**
-einum pedagogi at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja 1. august 2004 ella eftir nærri avtalu.
- einum pedagogi fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja 1. august 2004 ella eftir nærri avtalu.Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett fyribils í starv.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum við Bóla í hendi innan **hósdagin 17. juni 2004.**

Leiðari: Elsa Nielsen tlf.421375
í Líðini 20,
410 Kollafjørður

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran, ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Barnaansingin**
Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar dagrøktarskipanina, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

**Býlingshúsið á Ternuryggi**
Á stovninum er ein vøggustova við 12 børnum og tvær barnagarðsstovur við 20 børnum í hvørjari. Tilsamans 11 starvsfólk eru í býlings- húsinum

**Dagstovnurin við Botnánna**
er gamli frítíðarskúlin, iðer útbygdur soleiðis, at børn eisini ganga í barnagarði har. Í barnagarðinum ganga 20 børn og í Frítíðarskúlanum ganga 25 børn.

**Frítíðarskúlin Stoffalág 60**
Í frítíðarskúlanum ganga 28 børn í miðhæddini og 20 børn á loftinum. Trý starvsfólk eru á hvørjari hædd. Karmarnir eru góðir til mennandi virksemi bæði innan- og uttandura.

**Býlingshúsið Inni á Gøtu**
Í býlingshúsinum ganga 42 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum við 21 børnum í hvørjari. Á stovninum eru 9 starvsfólk.

**Barnagarðurin millum Bóla**
Stovnurin er normeraður til 40 børn í aldrinum 3-7ár.

Barnagarðurin millum Bóla liggur mitt í bygdini og stutt er oman í fjørðuna.

www.torshavn.fo



## Fráboðan um loyvi til aftursøkking

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 1. juni 2004, við heimild í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001, um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum, hevur givið **Tórshavnar havn** loyvi til aftursøkking av tilfari

**sunnan fyri molan á Skansabryggjuni, umleið á knattstøðu 62º00,18' N og 06º45,68' W**

Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Loyvi liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Loyvi kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**


# HEILSANIR



**Allarbesta Fríðunn**
Hjartaliga tillukku við tínum fyrsta runda degi í dag. Jesus signi framtíð tína.
**Ynskja mamma, babba, didda og beiggi**



**Góði elskaði babba**
Hjartaliga tillukku við 26 ára degnum 31. mai. Eg elski teg. Eisini ein heilsan til Marnu-ommu.
**Ynskir Markus**



**Góði Bjartur**
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum 2. juni. Jesus pápi signi teg.
**Ynskja Mamma, babba og beiggjarnir**







VARPIÐ
Skráir og ummælir
16 síður
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2




# TILTØK

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 19 Møtirøðin »Rørir tað teg?« v/ Robert Bwalya..
Í morgin kl. 19 Møtirøðin »Rørir tað teg?« v/ Robert Bwalya.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, ABC v/ Frank Jacobsen, evnið er: Fyrigeving við blóði Jesusar, 1. partur, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin saman við Rhema, Evangeliihúsinum og Meinigheitini í Hoyvík. www.filadelfia.fo

**Frelsunarherurin, Tórsgøta**
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti, kl. 19.30 Menn samlast.
Hósdagin kl. 20 Korpsráð.

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin kl. 19.30 í KFUK: Ytrimissiónskvøld, Maureen Djurhuus Clarke greiðir frá sínum arbeiði í Móritania. Innsavning.
**Sunnudagin 6. juni:**
Eldrasamkoman og varðmenn fara útferð vestur íVágar. Vit møtast í KFUK kl. 9 sunnumorgunin til kaffi og rundstykkir. Tað er neyðugt at tekna seg til útferðina á tlf. 311824 ella 311928 og á fartlf. 211824 í seinasta lagi fríggjadagin 4. juni kl. 14.00.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
(inngongdin er flutt til nýggjaskúla)
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 verður evnið: Truplir spurningar úr Bíbliuni »Hvat við teimum, sum ongantíð hava hoyrt?«. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 er evnið: »Halgan«. Á báðum møtunum talar Zacharias Zachariasen. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Sunnudagsskúli er kl. 12.
Drekkamunnur millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 Bøn- og bíbiltími, samandráttur av Opinberingini. www.livdin.fo

**Meinigheitin í Hoyvík uppi á Brekku 3**
Í kvøld onki ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 After Eight.
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta kl. 11 v/ Paula Høj. Evnið: Trúfesti, sunnudagsskúli kl. 12. Útimøti á Vaglinum kl. 22.
Mánakvøldið kl. 20 Felags Bønarmøti í Filadelfia.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

**Ebenezer**
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10 Minnismáltíð Harrans. kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 Mánaðarmøti: Trivnaður í samkomuni, Poul Færø talar.

**Samkoman Rhema**
Einki møti sunnudagin vegna legu. www.rhema.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Í kvøld kl. 20 Møti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti.

**Meinigheitshúsið**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Snorra Brend, evnið: Jesus.
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Bergur D. Joensen, Meinigheitskórið syngur.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hósdagin kl. 20 verður Taizékvøld (bønarstund hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16). Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Wladyslw Zdunek, presti í Mariukirkjuni, kl. 14 sunnudagsskúli.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Kaldbak**
Heimamissiónin hevur útimøti leygarkvøldið kl. 20 við skúlan.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Gunnar Reynslág av Argjum.

**Hvalvíkar Missiónshús**
Í sambandi við 100 ára haldið hjá Heimamissiónini verða vikuskiftismøtir í missiónshúsinum.
Leygarkvøldið kl. 20 við luttøku úr Porkeri har Hilmar Bech og Magnus Hansen tala og Streingjakórið syngur.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli kl. 18 Møti við Niels Jacob Nielsen, trúboðara, Johanna, Halgerð og Marita syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Jan Jacobsen, Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Johild Finsson talar. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.jesus.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30.
Mánakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 16 Felags barnamøti verður fyri smáir einglar, sólstrálan og stríðsmenn. Sonni kemur og greiður frá arbeiðinum í Papa New Guinea, gáva kann latast til arbeiði. Vælkomin í Betania.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 31. mai.***
kl. 10-10.30 **2. hvítusunnudagur – stongt.**
***Týsdagur 1. juni***
kl. 10-11.30 Sangur, Óli Vang. Vit fáa vitjan úr Íslandi. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15-17 Opið hús
***Mikudagur 2. juni***
kl. 10-15 Opið hús
kl. 15 **Vit vitja framsýningina: »Lær um upphav Føroya« á Føroya Náttúrugripasavn og Jarðfrøðissavnið. Kostnaður 20,-**
***Hósdagur 3. juni***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 4. juni***
kl. 12-20 **Tiltak í Grasagarði frá kl. 15-20 »Litir og lutir renna millum runnar«. Drekka og rabarbukøka verður at fáa**

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eysturoyar Gongufelag**
Gongutúrur verður í Skúvoynni sunnudagin 6. juni. Gingið verður í Fagradal við meira. Vit møtast á Gomlu Rætt kl. 9.30. Túrurin er miðal. Havi matpakka við. Ferðaleiðari er Óla Jákup Hentze úr Skúvoy. Tilmelding á Kunningarstovunum í Eysturoynni innan fríggjadagin 4. juni kl. 15.
Fuglafjørður tlf. 444860
infoey-f@post.olivant.fo
ella Runavík tlf. 449449
infoey-r@post.olivant.fo
**Farið verður til Hetlands mánadagin 21. juni og komið verður aftur mikudagin 23. juni.**
Kostnaður íroknað ferðing og gisting: Í 4-koyggju kamar umborð á Norrønu + 1 nátt á hotel í Lervick í dupultkamar kr. 1825 (einkult kamar á hotellinum 300 kr. eyka).
Tilmelding á Kunningarstovunum í Eysturoynni innan hósdagin 10. juni,
Runavík tlf. 449449
infoey-r@post.olivant.fo
og Fuglafjørður tlf. 444860
infoey-r@post.olivant.fo

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
***Týsdagin 1. juni***
Ítriv fyri áhugað
***Mikudagin 2. juni***
Helen og Eyðun Joensen greiða frá ferð teirra í Kina
***Hósdagin 3. juni***
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
***Fríggjadagin 4. juni***
Opið hús

*Tú fært altíð ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks.*

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

# BRÚDLEYP

Leygardagin 29. mai *giftust* í Majbølle Kirke, Lolland Selma Sørensen, Sørvágur og Dennis Uhrfeldt Jørgensen, Keypmannahavn.

Leygardagin 29. mai *giftust* Maud Elmarsdóttir Olsen og Mads Andrias Winther Olsen í Skála kirkju.

Leygardagin 5. juni giftast Elsebeth Joensen, Fuglafjørður og Óttar á Lofti, Sandavágur. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 16.00. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.30.

Leygardagin 26. juni kl. 15.00 giftast í Býráðshøllini í Klaksvík Ragnhild Ásbjørnsdóttir Justesen, Klaksvík og Petur Sigurd Justesen, Hvannasund. Veitslan verður á Klaksvíkar Sjómansheimi kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp biðjast vinarliga siga frá á tlf. 271294 ella 265976 innan 14. juni.

Leygardagin 26. juni kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Sanna Poulsen og Jóan Pauli Joensen, Tórshavn. Veitslan verður hildin í B-36 húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn tann 14. juni á tlf. 322669, 223769 ella 223027.

Leygardagin 26. juni kl. 15.00 giftast í Kollafjarðar kirkju Gudny Johannesen og Rodmund Magnussen á Signabø. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 14. juni á tlf. 421489, 421449 ella 421569.

26. juni kl. 16.00 giftast í Skopunar kirkju Annika Ryggstein og Remi Nicolajsen. Vælkomst verður í Samljóð kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá innan 12. juni á tlf. 361955, 361047 ella 361779.

Leygardagin tann 26. juni giftast Laila Haraldsen, Argir og Sámal av Reyni Tórshavn. Vígslan verður í Ebenezer kl. 14.00. Veitslan verður hildin kl. 18.00 í Reyni Service, Vegurin Langi, Hoyvík. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 315829 ella 317899 ella senda ein teldupost til laila.haraldsen@kallnet.fo ella samal_reyni@yahoo.dk áðrenn 5. juni.

10. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Solina Joensen, Skopun og Hans Ib Jacobsen, Tórshavn. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp kunnu tekna seg á tlf. 255263 ella 320391 eftir kl. 19. Seinasta freist at tekna seg er 15. juni.

Tann 29. juni giftast á Ráðhúsinum í Herning, Helma Jacobsen og Karl Dam, Sinding. Í hesum sambandi hevði tað glett okkum at sæð familju og vinir til døgurða í Sinding forsamlingshúsi fríggjadagin tann 2. juli kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 20. juni á tlf. 0045 97136669.

# SILVURBRÚDLEYP

23. juni hava Petra og Hans Jørgin Nysted í Hvannasundi verið gift í 25 ár. Silvurbrúdleypsveitslan verður hildin á Hotel Norð 26. juni kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 452105 áðrenn 14. juni.

# GULLBRÚDLEYP

Sunnudagin 4. juli hava hjúnini Jóna og Hans Jacob Andreasen, Klaksvík, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Tekniska skúla í Klaksvík leygardagin 3. juli kl. 16.00. Tey, sum vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 455782 ella 456772 innan 21. juni.